Nú boringin hjá Hess nærkast málinum:

Útlendskar fyritøkur gera innrás

John Colegrave frá Stolt Offshore á kunningarferð í Føroyum undan møguligari oljuútbygging
Mynd Jan Müller

-Føroyingar eiga nógv væl útbúgvið fólk og fyritøkur, sum eru væl egnað at arbeiða í oljuvinnuni og gera vørur og tænastur fyri stóru kontraktørfyritøkurnar, ið arbeiða fyri oljufeløgini. Hetta sigur umboð fyri Stolt Offshore, sum vitjar í Føroyum saman við øðrum skotskum fyritøkum

OLJUVINNA
Jan Müller

Um sama mundið sum oljufelagið Amerada Hess er við at røkka málinum í tí umleið 4200 metra djúpa brunninum við markið vitjar ein sendinevnd úr Skotlandi í Føroyum. Tað er býráðið í Aberdeen, sum skipar fyri ferðini hjá umleið 7 skotskum fyritøkum, sum arbeiða í fiskivinnuni og oljuvinnuni. Ein av hesum fyritøkunum er Stolt Offshore Limited, sum er ein av teimum stóru kontraktørfyritøkunum, ið oljufeløgini brúka. Fyritøkan hevur sín uppruna í Noregi men arbeiðir kring alla verðina. Hon hevur meira enn 6000 fólk í arbeiði. Millum hesi er John Colegrave, sum stendur á odda fyri nýggjum avbjóðingum á marknaðinum. Og slík nýggj avbjóðing er Føroyaøkið.

John Colegrave hevur vitjað fleiri føroysk virki, Oljumálaráðið og TK-stovuna. Hann hevur hann fingið innlit í føroyska fyrisiting og vinnu og fingið eina hóming av, hvussu langt føroyingar eru komnir at fyrireika seg til eina komandi oljuvinnu. Fyritøka hansara, sum arbeiðir í nógvum londum, arbeiðir serstakliga í útbyggingarfasuni tvs. tá oljufeløg taka avgerð um at byggja út eitt felt, so bjóðar Stolt Offshore seg fram við sínum mongu loysnum tað veri seg í sambandi við pallar, framleiðsluskip, rørleiðingar, útbúnað á havbotninum ella tænastur í hesum sambandi. Fyritøkan hevur júst staðið fyri byggingini av heimsins størsta framleiðslu og goymsluskipið FPSO, Girassol í Afrika. Nú venda teir so eisini eyguni móti Atlantsmótinum og her serstakliga Føroyum sum eitt heilt nýtt øki. Teir hava annars verið við í arbeiðinum uppá bæði Foinaven og Schiehallion oljufeltini skamt frá markinum.

John Colegrave er sera fegin um ta hjálp, sum teir hava fingið frá ídnaðarráðgevingini hjá Agip í Føroyum og hava teir notið væl av samstarvinum við Ólav Gregersen, sum Agip hevur sett sær at taka sær av slíkum.

Á føroyavitjanini hevur hann hitt umboð fyri ymsar fyritøkur. - Kemur tað hartil, at útbygging av oljufelti fer í gongd í Føroyum, og vit skulu vera við til at gera arbeiði, so er tað rættiliga týdningarmikið fyri okkum at kunna brúka føroyska vinnu eisini. Her sipar hann m.a. til ekspertisu og útbúgvið fólk á landi til at kunna halda við líka og umvæla útgerð umborð á skipum og pallum teirra. Men hann hugsar eisini um fyritøkur í landi, sum kunnu vera við til at byggja tann útbúnað, sum ein feltútbygging krevur. Í hesum sambandi kunnu verkstaðir og skipasmiðjur koma uppá tal.

Stoltmaðurin heldur, at føroyingar eru sera væl fyri við fólki og útgerð í fiskivinnuni og vísir á, at hetta er av stórum týdningi, um ein oljuvinna tekur seg upp. Tá eigur ikki at verða so torført at umleggja arbeiðið til eisini at fevna um eina oljuvinnu. Hann heldur tað vera rætt av føroyingum at menna virkini soleiðis at tey fáa ta altjóða góðkenning, sum er neyðug fyri at kunna arbeiða í oljuvinnuni, eitt nú ISO 9000 góðkenning.

Rætta løtan

Uppá fyrrispurning um hann ikki er komin ov tíðliga til Føroya, nú einki lønandi oljufund enn er gjørt sigur John Colegrave, at tú ongantíð kemur ov tíðliga, tá hugsað verður um, at olja er funnin og ein týðandi boring er í gongd fyri at vita, um talan er um lønandi fund. Hann heldur hetta vera røttu løtuni at fylgja við, hvat fer at henda. Verður lønandi fund gjørt nú,og tað ikki skulu nógvar boringar aftrat fyri at staðfesta fundið og støddina og slag av reservoiri, so kann ein framleiðsla byrja um eini 3 til 4 ár. Men skulu fleiri brunnar borast fyri at finna fram til, um fundið er lønandi, so vil hetta sjálvandi taka longri tíð. Sum er hoyrir Føroyaøkið undir skrivstovuna í Aberdeen, men John Colegrave dylur ikki fyri, at fer útbygging í gongd, so kann tað henda, at hon fer at verða stýrd úr Noregi, hetta orskað av mentanini og málinum.

Eins og føroyingar fylgir eisini John Colegrave frá Stolt Offshore væl við boringini hjá Hess. Verður lønandi oljufund staðfest er mest sannlíkt, at oljufeløgini fara at brúka eitt framleiðslu og goymsluskip, nevnt FPSO eins og tey á Foinaven og Schiehallion feltunum. Hóast rørleiðingskipanir eru tær bíligastu uppá longri sikt, so er Atlantsmótið enn ov ungt til at hýsa eini útbygdari rørleiðingsskipan. Tó so at skjøtil er settur á í og við at ein rørleiðing er løgd frá Foinaven og Schiehallion og víðari til Hetlands og Magnus oljufeltið í Norðsjónum. Verða nýggj oljufund gjørd kring markið kann tað gera eina rørleiðingsskipan til hesi felt lønandi. Í hesum sambandi er vert at nevna, at BP er farið at menna stóra Clair-feltið og er tað eisini uppá tal at lata upp fyri Suilvenfeltinum, sum liggur tætt við markið.

Hjá Stolt Offshore fylgja teir sera væl við hesi gongdini. Og er henda fyrsta Føroyavitjanin nakrantíð ein liður í hesum arbeiði. John Colegrav e vísir á, at teir eru vanir við at arbeiða á djúpum vatn i sum í Føroyum. Tí vilja teir eisini bjóða seg fram til at vera við í útbyggingum á føroyaøkinum og kunnu teir koma við eini loysn, sum er egnað til hetta farvatnið. Teir hava so eisini øll tey skipini, sum skulu leggja útbúnað og útgerð uppá pláss á havbotninum.

Stolt Offshore arbeiðir víða um í oljuvinnuni og heiminum. Frá heimasíðuni hjá Stolt

Suðuroyingar

Skeiø til buss,lastbil og tailara byrjar mikudagin 16. okt.kl.19.00.

Sp/f Koyrikortio
Tlf.318821 ella 218777

Timburarbeiði

Alt vanligt timburarbeioi verour gjørt.

Tlf. 311057 / 264694

Ellis- & avlamisheimið í Vágum

H-deildin – Avloysarastarv

Søkt verour eftir heilsuatstøoingi / sjúkrahjálpara á 0.64 tío.

Starvio er tíoaravmarkao frá 1. nov. 2002 til 1. nov. 2003.

H-deildin er ein vard eind vio plássi fyri 9 búfólkum, io hava sjúkuna demens.

Dentur verour lagdur á, at umsøkjarin hevur hug, hegni og førleika at veita eina góoa tænastu til brúkaran, eins og góo samstarvsevni hava stóran tydning.

Umsókn vio neyougum prógvum v.m. verour at stíla til styrio og senda til heimio skjótast gjørligt.

Setanartreytir sambært sáttmála millum AHF Almanna og Heilsurøktaralfeagio og Fíggjarmálaráoio.

Føroya Studentaskúli og HF-skeið

Hoydalar
FO-188 Hoyvík
Tlf. +298 312973 · Telefax +298 318624

Søkt verour eftir burоarvikarum í lærugreinunum **søgu** (umleio 16 tímar/viku) og **sálarfrøoi** (4 tímar/viku) frá 25. nov. 2002 til 10. juni 2003.

Størvini veroa sett sambært sáttmála millum YF (Yrkisfelag Studentaskúla- og HF-lærara) og Føroya Landsstýri.

Avrit av prógvum ella úrskrift av próvtøkubók skal hjáleggjast.

Umsøkjarar uttan endaligt prógv kunnu eisini søkja.

Umsóknir skulu vera rektaranum í hendi í seinasta lagi 4. november 2002.

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi partafelag:

Skrásetingar-nr. P/F 3430
Navn: P/F Suðuroyar Heilsøla
Adressa: 900 Vágur
Kommuna: Vágs Kommuna
Stovningardato: 17.07.2002
Viðtøkudato: 17.07.2002
Kapitalur: Kr. 550.000,00
Inngjaldingarháttur: Kontant kr 550.000,00 til kurs 100.
Stovnarar: Aleksander Nordenskjold Vilhelm, 900 Vágur, Helgi Kristiansen, 900 Vágur, Poul Johannes Poulsen, 970 Sumba, Henning Joensen, 900 Vágur, Jákup Olsen, 900 Vágur, Jacob Pauli Hammer, 850 Hvalba, John Henrik Holm, 900 Vágur
Nevnd: Aleksander Nordenskjold Vilhelm, 900 Vágur (formaður), John Henrik Holm, 900 Vágur, Helgi Kristiansen, 900 Vágur, Jákup Olsen, 900 Vágur, Henning Joensen, 900 Vágur, Poul Johannes Poulsen, 970 Sumba og Jacob Pauli Hammer, 850 Hvalba.
Stjóri: Magnus Jacob Jensen, 960 Hov.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av nevndarformanni saman við stjóranum ella av allari nevndini.
Grannskoðari: Sp/f Hanssen, Tróndargøta 39, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 17.07.2002 - 31.12.2003
Endamál: Endamál felagsins er at reka handil við heilsølu og annað arbeiði í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 9. oktober 2002

Kristin Bolle

Goymsluleiðari

Goymsluleiðari okkara fer nú frá fyri aldur, og tí skulu vit seta nýggjan í starv.

Vøksturin í virksemi okkara, og økta kravið til vøruflutning frá leverandørum/skipafeløgum til kundar okkara, krevur at viðkomandi er førur fyri at leggja arbeiðið væl tilrættis, soleiðis at vøruflutningurin verður effektiviseraður og rationaliseraður.

Starvið: Tú fært yvirordnaðu ábyrgdina av goymsluni, ið hevur eina fíggjarætlan uppá uml. 5 - 6 mill.kr. árliga. Til hetta krevst at skipað verður væl fyri, soleiðis at verandi skipanir verður foreinklaðar á ein tryggan og praktiskan hátt, men við atliti til heildina.

Av ítøkiligum ábyrgdarøkjum kunnu nevnast:

- Vørumóttøka.
- Eftirkannan av inngangandi vørum.
- Goymsla.
- Allur vøruflutningur.
- Optimering av pappirsgongdini.
- Starvsfólkaleiðsla á goymsluni.

Við budgetábyrgd fyri tínum virkisøki, verður tað tín uppgáva, alla tíðina at rationalisera og effektivisera alt logistikøkið, soleiðis at serviceevni verður hækkað, og at virkið økir kappingarevnini við serskildum eftirliti við útreiðslunum.

Sum goymsluleiðari verður tú við í budgetbólkinum á virkinum, og hevur tilvísing til stjóran.

Vit vænta: at tú hevur eitt gott praktiskt støði, kombinerað við einari relevantari útbúgving. Undir øllum umstøðum mást tú dokumentara ítøkilig úrslit.

Tú hevur lætt við at arbeiða saman við øðrum, í løttum umhvørvi, men altíð professionelt.

Tú hevur ans fyri smálutum, og arbeiðir skipað og áhaldandi við uppgávum tínum, og dugir at loysa tær. Tú ert konsekvent/ur tá ein avgerð skal takast, og hevur ríkiliga orku og dynamikk.

Vit bjóða: Eitt spennandi starv í eini sterkari fyritøku. Góðar setanartreytir og lønarviðurskifti, í einum opnum umhvørvi saman við góðum starvsfeløgum.

Umsókn: Við avriti av prógvum, viðmælum v.m. verður at senda til:
pf. Balslevs Timburhandil & Byggibúð - Postboks 3309 -
110 Tórshavn.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Adam Madsen ella Bent á Lava á tlf. 311122